## Ruddaðu í Árnafirði

Um vikuskiftið varð skipað fyri ruddingardegi í Árnafirði, har umboð frá øllum húsarhaldum luttóku. Úr Árnafirði (myndin) fréttist, at dagurin eydnaðist sera væl, og at bilurin hjá IRF bleiv fullur, eins og ein bingja á havnarøkinum varð full. Harumframt varð ein fullur bilur av ruski koyrdur til Endurnýtsluna í Klaksvík. Heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu skrivar, at aftaná ruddingardagin var hugni á skránni, har fólk, ið høvdu ruddað, fingu búffar og pylsur.



## Gera heildarætlan fyri Árnafjørð

Á seinasta býráðsfundi samtykti Klaksvíkar kommuna eina heildarætlan fyri bátahylin í Árnafirði. Ein umsókn er send um pláss til eina bingju, ið ætlanin er at umbyggja til ein skúr og frystarí. Út frá hesi hevur býráðið samtykti, at bingjur skulu ikki standa sjónligar, men at byggjast kunnu skýlir sum skulu líkjast neystabygging. Byggjast skulu tvær slíkar eindir samstundis. Tilmælið um heildarætlanina varð samtykt.



# Ein størri kommuna í august mánaði

**- Eitt uppskot til sáttmála um samanlegging av Hvannasunds og Klaksvíkar kommunum er nú klárt, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*

**Klaksvík/Hvannasund:** Síðan síðst í august í 2007 hava umboð fyri Klaksvíkar og Hvannasunds kommunur við jøvnum millumbilum havt samráðingarfundir.

Nú fyriliggur eitt uppskot, sum er so at siga klárt at leggja fyri almenningin og kommunustýrini til endaliga góðkenning.

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, sum hevur staðið á odda fyri samráðingarbólkin hjá Klaksvíkar Kommunu, upplýsir fyri heimasíðuni hjá kommununi, at samráðingarnar hava gingið sera væl.

- Vit høvdu okkara fyrsta fund tann 31. august í fjør, beint eftir at Hvannasunds Kommuna hevði samtykt at fara undir samráðingar okkum um eina møguliga samanlegging, sigur borgarstjórin.

Hann leggur aftrat, at tað sjálvandi eru mál, sum teir hava verið noyddir at mýkt fyri at finna fram til loysnir.

- Men eg haldi, at báðir partar her hava víst ein vilja og skynsemi til at finna fram til semjur, sum báðir partar kunnu ganga inn fyri, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

### Avgerð í august

Upprunaliga var ætlanin at hava eitt uppskot klárt áðrenn summarfrítíðina í ár, men nú er greitt, at avgerðin fellur í august mánaði.

Samráðingarbólkarnir hava avtalað, at endaliga uppskotið til sáttmála nú verður skrivað liðugt. Síðan verður kunningartilfar um sáttmálan sent út til íbúgvarnar í Hvannasunds Kommunu fyrst í august mánað.

Um miðjan august verður borgarafundur á Fossánesi, og ætlandi verður fólkaatkvøða 28. august.

- Eftir fólkaatkvøðuna taka kommunustýrini endaliga avgerð í málinum, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

## Kommunan skal eita »Norðoya Kommuna«

Tann fyrsta kommunusamanleggingin í Norðoyggjum í nýggjari tíð hendi í 2004, tá ið Mikladals og Klaksvíkar kommunur løgdu saman.

Fyrr í ár skrivaðu Svínoyar og Klaksvíkar kommunur undir ein sáttmála um samanlegging, sum landsstýrismaðurin í løgmálum síðani hevur góðkent.

Við hesum báðum samanleggingum kemur talið av kommunum í Norðoyggjum niður á seks, og harafturat fara í løtuni fram samráðingar um tvær samanleggingar afturat.

Umframt Klaksvíkar og Hvannasunds kommunur er Húsa Kommuna áhugað í einari møguligari kommunusamanlegging, og fara í løtuni samráðingar fram um tað.

Um hesar samanleggingarnar gerast veruleiki, skal tann samanlagda kommunan fáa navnið 'Norðoya Kommuna', tí talan verður um ein ógvuliga munandi part av Norðoyggjum, sum tá verður saman í einari kommunu.



*Klaksvík er stór í vavi, men verður nú uppaftur størri sum ein partur av eini stórari felagskommunu í Norðoyggjum við navninum »Norðoya Kommuna«.*
*– Samráðingarnar hava gingið sera væl, sigur Steinbjørn O. Jacobsen*
*Mynd: Høgni Thomsen*

## Nógv telving um Norðoyastevnuna

Hóast tey flestu tiltøkini á norðoyastevnu verða leygardagin og sunnudagin, fer hon í roynd og veru av bakkastokki klokkan 17:30 hósdagin.

Tá verður skipað fyri eini talvkapping fyri børn og ung í Skákinum á Akursmørk. Beint eftir at henda er liðug, verður ein snarkapping í talvi fyri vaksin á sama staði.

Sum um tað ikki var nóg mikið, so verður eisini ein talvkapping á Akursmørk bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

### Tónleikur í Leikalund

Tey, ið dáma væl at hoyra livandi tónleik fáa eitt gott høvi til hetta á stevnuni leygardagin.

At so hetta tiltakið verður hildið í hugnaligum umstøðum í Leikalund sum ein tónleikacafé, ger tað bara enn meiri spennandi.

Henda serstaka Leikalund-café'in letur upp klokkan 15 leygardagin, og frá klokkan 20 fara trý fólk at framføra.

Tey trý eru Hanna Jensen, Petur Martin Jóhannesen og Kristian Hansen, og fara tey at framføra einar tveir tímar ella so.

### Fleiri konsertir hóskvøldið

Herfyri gav kendi sangarin Hanus G. Johansen úr fløguna »Gaman og Álvara«, og hóskvøldið verður hann at hoyra live í Klaksvík. Samstundis við hetta verður høvið at fáa ei autograf á fløguhúsan.

Hetta kvøldið verður eisini ein onnur konsert í Klingrugarði, har fleiri kór og einstaklingar fara at føra fram. Hesi eru 17 sangarar, kvinnukórið Suð, Monika Stauss Joensen á violin og Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð á klaver.

## Midnátt í Vágstúni

Eitt av væl umtóktu og hugnaligu tiltøkunum á Norðoyastevnu plagar at vera midnáttarsamkoman.

Heldur ikki ár verður spart uppá krútið við hetta høvið. Henda samkoman byrjar longu leygarkvøldið kl. 23 við at Klaksvíkar hornorkestur spælir í ein hálvan tíma í Vágstúni.

Síðani syngur felagskórið Gøta-Leirvík, inntil ein kyndlagonga kemur heim í Vágstún, har Niclas Heri Jákupsson flytur fram røðu.

Aftaná verður fýrverkarí í Vágsbøi og felagssangur.

### Gongutúrur til Skálatoftir

Eru fólk troytt av stevnu og tiltøkum, ber til at fara ein gongutúr við Norðoya Gongufelagi.

Nýstovnaða gongufelagið skipar nevniliga sunnudagin fyri einum hugnaligum og søguríkum gongutúri av Strond og norður í avtoftaðu bygdina Skálatoftir.

Túrurin varir í 4-5 tímar, og verður gjørdur við staðkendum frásøgufólki.

### Skrúðgonga í Vágstún

Norðoyastevnan verður sett fríggjakvøldið kl. 20 av Jórun Høgnesen, næstformanni í mentanarnevndini.

Sunnudagin kl. 14 verður eisini eitt líknandi tiltak, tá Klaksvíkar Hornorkestur fer at ganga á odda í eini skrúðgongu við skótum, ítróttarfólkum og hestum.

Henda skrúðgongan fer úr Klaksvíksgarðinum og heim í Vágstún, har borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen fer at flyta fram røðu.